# eina kontakt leygardag




*David og Gaby og mong onnur kunnu takka hesum manni fyri, at teir yvirhøvur eru til. Hann fekk nevniliga bjargað ommum teirra undan jødatýningini hjá Hitler*

fullan. Tað er hátíðin fyri heingingina av Háman, sum í Esthers bók í Bíbliuni vildi beina fyri jødum!

### Hóast tað tollyntir

So ortodoksur sum David er, so er hann meira tollyntur enn vanliga verður roknað við av ortodoksum jødum.

Hann kundi góðkenna, at Ísrael gav land frá sær fyri frið, um hetta veruliga kundi tryggja frið. Men hann trúði nú ikki, at júst hetta við at fara úr Gaza, sum hendi í 2005, fór at geva frið. Allar royndir vísa, at tað nyttar einki at geva víttgangandi kreftum lítlafingur. Tær gevast ikki, fyrr enn tær hava fingið alla hondina. Og tá ið teir hoyrdu ungar arabarar tosa, skiltu teir, at tað var framvegis arabiskt aðalmál at reka Ísrael í havið. So tað er kanska ikki so løgið, um teir eru varnir. Tað er eisini seinni váttað, at friður gjørdist eingin av nevnda stigi.

Viðvíkjandi kristnum trúboðaravirksemi millum jødar eru ortodoksir jødar ikki tollyntir. Teir halda, at jødar skuldu hava frið at hava sína trúgv, eins og teir geva kristnum frið at hava sína trúgv. Sjálvir reka teir ikki trúboðaravirksemi millum kristin. Um ein kristin ynskir at fara yvir til jødadómin verður meira mælt frá, tí tað er strævið at skula liva eftir ortodoksum jødiskum forskriftum. Hinvegin verður nógv gjørt fyri at fáa verðsligar jødar umvendar til at gerast ortodoksar. Tað hendir eisini, at tað eydnast.

### Væl skúlaður í trúnni

Annars er David væl skúlaður í jødiskari trúgv. Hann hevur verið tvey ár á Talmudskúla, jødiskum bíbliuskúla, í Ísrael, har hann eisini hevur lært hebraiskt, og nú ætlar Gaby at gera tað sama.

Her skal skoytast uppí, at jødar vanliga verða býttir upp í fýra bólkar: Tað er teir ultraortodoksu, sum als ikki viðurkenna Ísrael. Teir viðurkenna ongan stat, fyrr enn hann verður settur á stovn av sjálvum Messias. Teir eru lættliga kendir av sínum hári, sum hongur niður við oyruni. Síðan eru tað teir ortodoksu, sum eru sum David og Gaby. Ein bólkur eru nationalistar, zionistar, sum ganga høgt upp í tey gudsgivnu rættindi til "landið", ið Gud gav teimum. Fjórði bólkurin eru teir verðsligu jødarnir, sum kunnu sammetast við verðslig kristin.

### Ortodoks giftarmál

David greiddi eisini frá mannagongdini, tá ið ungir ortodoksir jødar finna saman. Høvuðsreglan er tann, at foreldrini hjá dreingi finna fram til eina hóskandi gentu, og skipað verður fyri, at tey hittast, í eini "date". Um bæði eru áhugað, so hittast tey aftur, og so kunnu tey verða trúlovað eftir tveimum mánaðum. Eftir enn nøkrum mánaðum verða tey so gift, og vanliga er tað fyri lívstíð.

Um ikki bæði eru áhugað, so gerst ikki við. Tá mugu foreldrini royna at finna eina aðra gentu. Einaferð man tað fara at eydnast.

Tað kann eisini henda, at tey bæði finna saman av sær sjálvum, men her er treytin tann, at bæði skulu vera ortodoks!

Nú eru teir báðir, David og Gaby, aftur í London. Tá ið teir hava havt eina væleydnaða "date" vænta vit, at teir koma higar við gentu ella konu.

Undir øllum umstøðum hevur tað verið stuttligt at koma at kenna teir báðar.





*Hesar báðar myndirnar eru frá synagoguni hjá David heima í London. Her sæst heilaga arkin fremst í synagoguni, har torarullurnar eru goymdar í metallhylkjum. Rullurnar eru av pergament, og skrivað er á tær við svørtum blekki við hond. Tað tekur umleið eitt ár at skriva tann partin av torarullunum, sum umfata tær fimm mósebøkurnar.*

*Ein partur av toraini verður lisin upp messandi hvørja sabbat. Seinasti partur verður lisin seinasta dagin á leyvsalhátíðini í oktober. Síðan verður rullan rullað aftur, og so verður byrjað av nýggjum.*